## Hvar fór Dan

Sambært Sosialinum í gjár var líkt til, at løgtingsmaðurin, Dan Reinert Petersen, hevði skift flokk. Soleiðis er tó ikki, men hinvegin var talan um mistak hjá okkum. Dan Reinert Petersen er framvegis tingmaður fyri Javnaðarflokkin. Vit biðja um umbering fyri mistakið.

**Blöm.**

# Avgreiðslugjaldið verður strikað

**Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur gjørt av at strika avgreiðslugjaldið til barsilsskipanina, sum fekk øði í arbeiðsgevarar**



*Landsstýrismaðurin hevur nú broytt innkrevjingina til barsilsskipanina, sum hevur skapt stór øsing millum arbeiðsgevarar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

STRIKA Í ROKNINGINI
*Eyðun Klakstein*

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur nú gjørt av at strika avgreiðslugjald, sum hevur verið lagt á inngjøld til barsilsskipanina.

Harafturat hevur hann eisini longt gjaldsfreistina hjá arbeiðsgevarum, so teir framyvir hava 20 dagar at gjalda rokningina í.

Eisini verður eitt sokallað bagatellmark lagt inn í skipanina, so at gjald til skipanina verður ikki kravt inn, fyrr enn tað er komið upp á 50 krónur.

### Skapti øsing

Tá fyrstu rokningarnar til barsilsskipanina vórðu sendar út herfyri, vóru tað arbeiðsgevarar, sum vórðu í øðini um, at teir skuldu gjalda so høgt avgreiðslugjald.

Onkur fekk rokning upp á eina krónu, men skuldi gjalda 100 krónur í avgreiðslugjaldi.

Fíggjarmálastýrið ásetti í eini kunngerð 5. juli í ár, at avgreiðslugjaldið skuldi verða 100 krónur, og hetta helt Fíggjarmálastýrið var hóskandi gjald.

Men nú hevur landsstýrismaðurin kolldømt hetta gjaldið, og arbeiðsgevarar sleppa framyvir undan hesum gjaldi. Harafturat fer Fíggjarmálastýrið at lata arbeiðsgevarum, sum hava goldið hetta avgreiðslugjald, pengarnar aftur.

### Kunnu velja

Meðan løntakarar gjalda sín part av gjaldinum til barsilsskipanina samstundis, sum teir fáa sín løn goldna, sleppa arbeiðsgevarar at velja ímillum at gjalda beinanvegin og at fáa rokning, har gjaldsfreistin nú verður 20 dagar.

Fíggjarmálastýrið ætlar, at arbeiðsgevarar framyvir skulu fáa rokning fýra ferðir um árið, og næsta innkrevjingin verður í september/oktober.

Fíggjarmálastýrið fer nú at gera nýggja kunngerð, sum verður kunngjørd í næstum.

## Aftur bilvanlukka í Øravík

**Alma Fossá**

9. august 2001 hendi tað so aftur. Ein bilur rendi á tornið í Øravík. Hevði førarin ikki havt »airbag«, var hann deyður.

Hví verður hatta tornið ikki fjernað??? Ella hví verður ikki »autovern« sett upp???

Skulu vit fyrst hava enn fleiri prógv um at har er vandamikið

# Súkklarar væl fyri til FM-kappingarnar

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Í vikuni var nýtt met sett á teininum frá Sundi til Kaldbak og á Sund. Teinurin er ofta brúktur til venjing av einkultstarti og er góður til at geva eina ábending um, hvussu støðan er hjá einstaka súkklaranum. Teinurin er umleið 12 km og er partur av 30 km teininum, súkklað verður til FM í einkultstarti.

Gamla metið er frá 1993. Tá súkklaði Gunnar Dahl-Olsen teinin í tíðini 18 minuttir 39 sekund. Fleiri royndir hava verið gjørdar at seta nýtt met, uttan at tað hevur eydnast. Jóhann Brend hevur altíð fingið góð úrslit á einkultstartinum. Hann vann m.a. fyrstu FM einkultstartskappingina í 1992. Tað vísti hann við góðum úrslitum bæði á Oyggjaleikunum í ár og til Statoil Kring Føroyar 2001, tá hann gjørdist nummar tvey í 27 km langa einkultstartinum á Sandoynni. Jóhann prógvaði enn einaferð í vikuni at formurin er í topp, tá hann súkklaði teinin Sund-Kaldbak-Sund við tíðini 18 minuttir og 22 sekund og slóg hervið 8 ára gamla metið hjá Gunnar Dahl-Olsen.

Gunnar Dahl-Olsen vísti eisini góðan form, tá hann setti nýtt persónligt met í tíðini 18 min. 35. sek. Hetta bendir á, at hann er við at finna gamla einkultstartsformin; frá 1993 og 94, tá hann gjørdist føroyameistari í einkultstarti. Hóast hann ikki hevur vunnið FM einkultstartin síðani tá, so hevur hann altíð fingið góð úrslit.

Tann av hinum luttakandi súkklarunum, sum var nærmast teimum báðum var Kári Simonsen, sum setti persónligt met í tíðini 20,52 minuttir og honum á baki

Esmar Joensen í tíðini 21,45 minuttir. Bæði Gunnar og Jóhann kláraðu seg sera væl til einkultstartin í Statoil Kring Føroyar á Sandi. Tá gjørdist Jóhann nummar 2 og Gunnar nummar 3, frammanfyri súkklarar sum koyra í A-bólkinum, saman við millum annað Rógva Johansen. Tá hugsað verður um, hvussu javnir Gunnar og Jóhann eru, er ongin ivi um, at FM 2001 í einkultstarti verður ein sera spennandi kapping. Teir siga báðir, at málið er at nærkast metinum hjá Rógva so nógv sum gjørligt. Kappast verður í trimum greinum til FM í ár: Einkultstartur (30 km), Býarkoyring (50 min. + 1 umgang) og Samlaður startur (100 km). Kappingarnar verða ávikavist 22., 24. og 26. august 2001. Stað·····ur í tíðspunkt verður lýst seinni.



*Jóhann Brend og Gunnar Dahl-Olsen á veg niðan á Oyggjarvegin*








# Brast í SEV-tornið



*Nógv umtalaða vegastrekkið í Øravík var aftur karmur um eitt ferðsluóhapp, men hesaferð spurdist tíbetur eingin álvarsamur mannskaði burturúr.*
*Mynd: Leivur Nygaard*

**Hósdagin hendi aftur ferðsluóhapp í Øravík. Einsamalli maðurin í bilinum breyt hondliðina, tá hann rendi saman við nógv um tala SEV-tornið við vegin**

FERÐSLUÓHAPP
*Eyðun Klakstein*

So hendi tað aftur.

Nógv umtalaða vegastrekkið í Øravík var aftur karmur um eitt ferðsluóhapp, men hesaferð spurdist tíbetur eingin álvarsamur mannskaði burturúr.

Ein ungur maður, sum var einsamallur í einum Toyota-bili, kláraði ikki at halda bilinum á vegnum. Han fór í veitina við vegnum og rendi beint inn í SEV-tornið, sum stendur við vegin.

Bilurin fekk stóran skaða, men ungi maðurin við rattið, slapp við einum brotnum handliði. Hetta varð hann viðgjørdur fyri á sjúkrahúsinum á Tvøroyri.

Óhappið hendi um trýtíðina seinnapartin hósdagin.

### Rúsdrekka uppií

Løgreglan heldur ikki, at maðurin hevur koyrt við nógvari ferð. Hann hevur kanska verið líka omanfyri hámarkið, men helst hevur ferðin ikki verið høvuðsorsøkin til ferðsluóhappið.

Løgreglan í Suðuroy hevur illgruna um, at maðurin hevði okkurt í blóðinum, sum hann ikki skuldi hava.

Blóðroynd er tí tikin av manninum, so løgreglan kann staðfesta promillustøðuna hjá manninum.

### Tiltikið strekkið

Tað eru áður hendar syrgiligar vanlukkur á vegastrekkinum í Øravík, og SEV-tornið, sum stendur nærhendis vegnum, hevur verið blandað uppí.

Landsverkfrøðingurin hevur kannað svingið, og teir halda, at vegurin er í lagi. Tað hevur verið tosað um at taka tornið burtur, men semja er ikki um, hvør skal gjalda kostnaðin av hesum.

Hósdagin hendi eingin álvarsamur skaði í ferðsluóhappinum, men tað er ein sannroynd, at ferðsluóhapp henda javnan á hesum vegastrekkið.



*Løgreglan í Suðuroy hevur illgruna um, at maðurin hevði okkurt í blóðinum, sum hann ikki skuldi hava, tá hann rendi á tornið seinnapartin hósdagin*
*Mynd: Leivur Nyggaard*


Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg



**VOLVO 240 GL**
Árg 1988, Km 180.000. 4 píkadekk á alufelgum fylgja við. Kr. 40.000.
*220407*



**BMW 316I**
Árg ca. 4 ár, Km 67.000. "el-sóltak, el-rútar 17""
sportfelgur+píkadekk á felgum, svørt leðursetur. Boð undir kr.150.000,- ongan áhuga". .
*221122*

